FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 25. oktober 2019

J.Nr.: 19/00369
(at tilskila í svari)
Tygara skriv:

Svar upp á fyrispurning nr. 10/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um asfaltverkið á Sundi

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv er samlaði kostnaðurin fyri asfaltverkið á Sundi, tað vil siga við leigu, umvælingum og keypi v.m.?
2. Var fíggjarlig heimild at leiga, umvæla og keypa asfaltverkið?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at kanna málið nærri?

Svar:
Sambært roknskapi hjá Landsverki fyri asfaltverkið á Sundi fram til nú hava útreiðslurnar av leigu, umvælingum, keypi o.t. verið 33,4 mió.kr.

	2016	2017	2018	2019	Tilsamans
Viðlíkahald og nýgerð	348	1.778	6.117	634	8.877
Leiga av asfaltverki	7.733	6.551	1.500	0	15.784
Keyp av asfaltverkið	0	0	8.782	0	8.782
Tilsamans	**8.081**	**8.329**	**16.399**	**634**	**33.443**

Í 2016 gjørdi Landsverk avtalu við eitt privat felag um at leiga asfaltverkið á Sundi. Løgtingsgrannskoðararnir hava síðani víst á, at talan var um fíggjarliga langtíðarleigu. Sambært játtanarskipanini er ikki loyvt at gera avtalur um fíggjarliga langtíðarleigu. Í apríl 2019 varð avtala gjørd við útleigaran um at yvirtaka virkið fyri 8,8 mió.kr.

Samanumtikið ber ikki til at siga, at Landsverk hevði heimild at langtíðarleiga ella keypa asfaltverkið á Sundi.

Og ja, málið verður kannað nærri.

Tinganes, 25. oktober 2019

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum